Foreldrafelagið
HEIM&SKÚLI

# Ein góð trivnaðarætlan

Sjónarmið frá Heim & Skúla
Landsfelag fyri foreldur og verjar at børnum í fólkaskúlanum

Vitan, veruleiki og visión - Skúlin sum slóðbrótari

12. og 13. september

# Endamál

Foreldrafelagið HEIM&SKÚLI

- Trivnaðarætlanin er bæði visión og amboð
  - Kann taka støði í § 2 og 3 í Fólkaskúlalógini: ”Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.” og ”Skúlin samstarvar við næmingar og foreldur um at megna tað, sum er ásett í endamálsgrein fólkaskúlans.”
- Trivnaðarætlanin setir karmar og gevur leiðreglur
- Trivnaðarætlanin skapar trivnað og fyribyrgir happing
- Trivnaðarætlanin er ein sálarfrøðiligur sáttmáli millum allar partar skúlans

# Innihald

Foreldrafelagið HEIM&SKÚLI

- Inngangur við yvirlýsing um, hvussu hesin skúlin fatar trivnað, gjarna við støði í virðisgrundarlagnum
- Ábyrgd og leiklutir
  - Lýsing av, hvørjar skipanir eru á skúlanum, sum stuðla uppundir trivnaðin, og hvør hevur ábyrgd av skipanunum
- Lýsing av, hvørji eru fevnd av trivnaðarætlan skúlans, t.d. lærarar, børn, foreldur, leiðsla
- Lýsing av afturvendandi tiltøkum í skúlanum, sløg, endamál og tíðarætlan, og rúmi fyri serligum tiltøkum

# Innihald II

Foreldrafelagið HEIM&SKÚLI

- Nakrar tankar um, hvat kann vísa, at trivnaðurin er góður ella ikki er góður
- Ein skilmarking av, hvat happing er - við dømum
- Ein greið lýsing av, hvussu verður farið fram, um trivnaðurin ikki er nóg góður
  - Hvør hevur ábyrgd av at handla í førum við happing ella mistrivnaði av øðrum orsøkum og hvønn næmingar, foreldur, lærarar og onnur kunnu venda sær til, um tey hava spurningar ella ítøkiligar støður, sum krevja handling.

# Innihald III

Foreldrafelagið HEIM&SKÚLI

- Ein umsorganarætlan í sambandi við álvarsliga sjúku, vanlukku, deyða ella annan miss
- Lýsing av og kontaktupplýsingar til
  - Leiðslu
  - Førleikastovu
  - AKT lærarar
  - Heilsusystir
  - Næmingaráð
  - Foreldraráð
  - Skúlastýrið

# At hava í huga

Foreldrafelagið HEIM&SKÚLI

- Trivnaðarætlanin má skrivast á máli, sum øll skilja, tí er neyðugt at avmarka fakmálið
- Trivnaðarætlanin skal ikki vera ov long og skal vera eitt konstruktivt skjal at lesa
  - Skjalið kann býtast upp í evnisbrot og má setast væl upp grafiskt
  - Gott hugskot at nýta myndamál og myndir at undirstrika evni
- Øll skulu kenna trivnaðarætlanina
  - Tá trivnaðarætlanin er samtykt, skulu øll hava eitt prentað eintak og kunna finna hana á heimasíðu skúlans

# Tankar

Foreldrafelagið
HEIM&SKÚLI

- Nemingurin og flokkurin er ikki altíð greitt í fokus
  - børnini hava rætt at vera hoyrd um viðurskifti, sum viðvíkja teimum. Virkin næmingaluttøka kann geva ognarskap,  ábyrgdarkenslu og greiðari fokus
- Stórt spenni frá sera yvirskipaðum til útgreining í smálutir – onkustaðni tykist eingin vera
  - Onkur ætlan upp í 50 síður, onkur nakað floskulkend, onkur avritað, onkur ikki almen - trupult at fáa ognarskap
- Fleiri skúlar hava happingarpolitikk ella –reglur heldur enn trivnaðarætlanir
  - Symptomviðgerð heldur enn leiðreglur og fyribyrging

# Ynskir

Foreldrafelagið HEIM&SKÚLI

- Allir skúlar taka upp (aftur) sína trivnaðarætlan saman við pørtum skúlans
  - Á leiðslustigi, á námsfrøðiligum fundi, á næmingaráðs-fundi og á felags foreldrafundi
- Trivnaðarætlanin verður viðgjørd og samtykt av skúlastýrinum
- Allir skúlar leggja trivnaðarætlanirnar og aðrar meginreglur á heimasiðu skúlans sum skjótast
- Mentamálaráðið eftirkannar allar trivnaðarætlanir í seinasta lagi 1.2.2016 og hjálpir, har tað er tørvur. Leinkja til allar trivnaðarætlanir á mmr.fo

Foreldrafelagið
HEIM&SKÚLI

Foreldrafelagið
HEIM&SKÚLI

Heimasíðan: http://heimogskuli.fo
Facebook: http://www.facebook.com/HeimOgSkuli
Teldupost: heimogskuli@gmail.com